## Operasangur í Suðuroynni

**Suðuroyingar sleppa í hesum døgum at hoyra operasang, tí sangarar frá Det Kgl. Teater eru á ferð í Suðuroynni**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sangarar frá Det Kgl. Teater vitja í Suðuroynni í hesum døgum og teir fara at hava konsertir í Vági, á Tvøroyri og í Hvalba. Á konsertunum verður sangur við urgu, klaveri og violin við tónleiki eftir m. ø. Buxtehude, Mozart, Verdi Haendel og øðrum. Framførslurnar fevna um opera, operettu og sangleik, umframt felagssang.

Fyrsta konsertin var í Vágs Kirkju mikukvøldið, hóskvøld er konsert í Tvøroyrar Kirkju klokkan 19 og fríggjamorgunin klokkan 11 er konsert í skúlanum í Hvalba.

Ferðin er stuðlað av Vágs Kommunu, Tvøroyrar Kommunu, Hvalbiar Kommunu og Kunningarstovuni í Vági, veit heimasíðan hjá Suðurrás at siga frá.

Danska ferðlagið fer aftur til Danmarkar sunnudagin.

## Nøvnini á AME kunngjørd

**Nú er greitt, at 12 nøvn taka lut í Atlantic Music Event, sum er endabresturin í Prix Føroyar kappingini**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


*Deja Vu*

Endaliga skráin fyri AME tann 23. apríl er nú greið og 12 nøvn standa á listanum yvir tey, ið fara á pallin. Tiltakið er eitt gallashow, har eisini útlendingar eru til staðar. Tey luttakandi eru hesi:

Gestir, Kristleif Z. 200, Týr , Eivør, Høgni Lisberg, Makrel, Guðrun Sólja Jakobsen og Deja Vu.

Beinleiðis úr prixsemifinaluni koma, Terji Rasmussen Band, "GO-GO - Blues" og "Eyðun og Showmenn", sum kappast um endaliga Prix Føroyar vinningin, sum er studiotíð t.d. í "Lundgaard Studios", luttøka á Ólavsøkukonsertini, G-Festivalin 2005 og Listastevnu Føroya 2006.

- Til stóra gallakvøldið Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum, verður dentur lagdur á góðan livandi tónleik, eina góða konsert í Norðurlandahúsinum, eini undirhaldandi sjónvarps- og útvarpssending og at marknaðarføra føroyskan tónleik bæði innan- og uttanlanda. Miðað verður eftir at geva út livandi konserttilfar frá Prix Føroyum 2005, siga fyrireikararnir.

- Arbeitt verður fyri at fáa so nógvar útlendskar lyklapersónar og fjølmiðlar sum gjørligt at koma til stóra gallakvøldið Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum. Higartil hava Íslendska RÁS 2, Morgunblaðið, Jyllandsposten og Musikeren boða frá at tey koma. Hartil koma fleiri útlendskir konsertfyrireikarar t.d. www.popagenda.se, norðurlendsk plátufeløg, og fleiri onnur til gallakvøldið Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

# Suðuroyggin og mentanin – um 2 ár og um 10 ár

**Hetta er heiti á evnisdegi, sum tónleikalærarar skipa fyri í Trongisvági 16. apríl. Umframt tónleik, so siga tingmenn, embætisfólk, lærarar og onnur sína hugsan um hesi viðurskifti. Á kvøldi er veitsludámur í Trongisvágshøllini**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


*Johan Dahl og John Johannesen eru millum teirra, sum leygardagin fara at geva boð uppa Suðuroynna og mentanina um 2 ár og um 10 ár á stórfingnari stevnu um evni í Trongisvági*

Almennt byrjar tiltakið "Suðuroyggin og mentanin - um 2 ár og um 10 ár", kl. 13 leygardagin í Trongisvágshøllini, men longu klokkan 12:45 verður lagt til brots við tónleiki. Klokkan 13 bjóðar Elin Nielsen vælkomin og so gongur skráin slag í slag; stuttir fyrilestrar á eini 10 minuttir og somuleiðis smærri tónleikainnsløg við tónleikanæmingum og lærarum og lokalum tónleikarum.

### Framstandandi røðarar

Og røðararnir eru ikki ein og hvør, men teljast millum tey andlit, ið vit kenna millum teirra, ið ganga á odda og vanliga hava eina meting um viðurskiftini. Talan er um politikarar, lærarar, bankafólk og onnur.

Eftir at Ulf Nordlunf, stigtakari og leiðari fyri Vágs Skúlaorkestur, hevur verið á palli og spælt og sagt nøkur orð um sønevnda "suðuroyarmodellið", ið er ein námsfrøðilig tilgongd, so fer Søren L. Bruun, sparikassastjóri at siga sína hugsan um Suðuroynna og mentan. Honum á baki koma Ole V. Laursen, studentaskúlaleiðari, Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri, Annlis Bjarkhamar, samskipari, Olavus Jespersen, mentamálaráðið, fólkaskúladeildin, Karin Brattaberg, vinnulívskvinna og Johan Dahl og John Johannesen, løgtingsmenn.

Á kvøldi klokkan 18 er veitsludøgurði, har Niels P. Nolsøe og Arnfinnur Thomassen standa fyri undirhaldinum. Seinni skipar Anna Kirsten Thomsen fyri dansi og dansifrálæru. Øll eru vælkomin til tiktakið og til ber at seta seg í samband við Ulf Nordlund á telduposti Ulfnordl@post.olivant.fo

**Skráin sær soleiðis út:**

kl. 12.45: Suðurrættin v/ Oddur Hentze
kl. 13.00: Vælkomin v/Elin Nielsen
kl. 13.05: Suðuroyarmodellið, v/ Ulf Nordlund
kl. 13.15: Vágs SkúlaOrkestur v/ Ulf Nordlund
kl. 13.30: Søren Bruun
kl. 13.40: Tvøroyrar Hornorkestur v/ Tróndur Enni
kl. 14.50: Ole V. Laursen
kl. 14.00: Kirkjukorið Ljómur
kl. 14.15: Kirsten Strøm
kl. 14.25: Tvøroyrar Skúli
kl. 10: fl.Band v/ Tróndur Enni
kl. 14.35: Annlis Bjarkhamar

Steðgur á 15 min. Kaffe, the og køkur

kl. 15.05: Brandur & Tróndur Enni
kl. 15.15: Olavus Jespersen
kl. 15.25: Suðurrættin v/Oddur Hentze
kl. 15.40: Karin Brattaberg
kl. 15.50: Tróngisvágs Samanspælsbbólkur v/ Otniel Nygaard
kl. 16.05: Johan Dahl
kl. 16.15: Harmonika v/ Hentzar Hammer & Jon Gulak Jacobsen
kl. 16.25: John Johannesen
kl. 16.40: Tvøroyrar Hornorkestur/ Suðurættin



# Konsertferð við føroyskum guitartónum

**Guitarkonsertir eru heldur sjáldsamar hjá okkum, kanska serliga á bygd, men nú er ungur evnaríkur guitarleikari á ferð við sponskum og klassiskum tónum og vitjað verður í Skopun, í Vági og í Havn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


*Komandi dagarnar fer ungi føroyski guitarleikarin Ragnar Olsen at hava konsertir í Skopun, í Vági og í Havn*

Ein ungur skopuningur er lagstur afturat úrvalsliðnum av dugnaligum tónleikarum her á landi. Hann leikar guitar og er nú á konsertferð.

Komandi dagarnar fer ungi føroyski guitarleikarin Ragnar Olsen at hava konsertir í Skopun, í Vági og í Havn.

Hetta er ein minni konsertferð, har ið Ragnar fer at bjóða áhoyrarunum spanskar tónar, tónar eftir mæta Johann Sebastian Bach og okkurt meira forkunnugt á klassiska guitarinum.

### Kirkja, Pakkhús og listaskáli

Ragnar Olsen hevur lokið diplomprógv á Vestjysk Musikkonservatorium í guitarleiki og frálæru. Hann starvast nú á Føroya Musikkskúla. Umframt at hava fingið sær hollan lærdóm á tónlistarskúla, hevur Ragnar luttikið á masterclasses við m.a. John Mills, Luis Zea, Alvaro Pierri og Timo Korhonen.

Ragnar er skopuningur og er tað eisini í Skopun at hann leggur fyri. Hann fer at framføra í kirkjuni í Skopun hóskvøldið 14. apríl kl. 19.00 og í Stóra Pakkhúsi í Vági sunnudagin 17. apríl kl. 19.00. Seinni verður eisini ein konsert í Havn, nevniliga í Listaskálanum sunnudagin 24. apríl kl. 19.00. Konsertfelagið skipar fyri konsertunum.